# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tvey ár við Rásini

Tá Føroya Løgting á sinni liberaliseraði kringvarpslóggávuna, var endamálið at geva øðrum enn tí almenna møguleika at senda útvarp og sjónvarp. Við nýggju kringvarpslógini frá 2006 varð hetta endamál gjørt greiðari og lógin var ein almenn ásannan av, at gamla kringvarpslógin ikki livdi upp til sítt endamál nevniliga at fáa til vega eina meira fjølbroytta fjølmiðlamynd í Føroyum. Sama ár kom lógin um fjølmiðlaábyrgd, og staðfestast kann, at við hesum báðum lógum høvdu landsstýri og løgting tikið stór og týðandi stig til tess at fáa føroysku fjølmiðlarnar upp á altjóða støði.

Sostatt vóru skaptar betri fortreytir fyri tí liberaliseringing av øllum loftmiðlaøkinum, sum var Løgtingsins vilji. Kappingarstøðan var tó framvegis ójøvn, og Kringvarp Føroya, sum framvegis varð fíggjað við kringvarpsgjaldi, slapp framhaldandi at supplera sínar inntøkur við lýsingum. Her var sostatt framvegis talan um lógfest kappingaravlagandi virksemi.

Lóggevarar okkara vóru sjálvsagt greiðir yvir, at heldur ikki nýggja kringvarpslógin frá 16. mai 2006 skapti fullar fortreytir fyri frælsari kapping á loftmiðlaøkinum. Teir løgdu til nakrar treytir inn í lógartekst og viðmerkingar, sum skuldu tryggja privatum loftmiðlum ein møguleika fyri at yvirliva, soleiðis, at vit veruliga høvdu ein liberaliseraðan loftmiðlageira í Føroyum. Alment fíggjaða Kringvarp Føroya er ikki loyvt at hava handilslýsingar á sínum heimasíðum og Løgtingið boðaði klárt og greitt í viðmerkingunum frá, at lýsingarnar í Kringvarpinum skuldu trappast niður.

Hesar eru fortreytirnar hjá tí, sum roynir at reka útvarp ella sjónvarp á privatum støði í Føroyum. Ikki júst nakrar ynskifortreytir, men vit her í húsinum hava trúð og trúgva framvegis, at hetta ber til. Vit hava sett okkara álit á møguleikarnar fyri konvergensi og menning, ið eru til staðar í Miðlahúsinum við blað, útvarpi, portali og mentanarligum og debatskapandi tiltøkum í sjálvum húsinum í Vágsbotni. Vit liva og virka í tí føstu trúgv, at tað ber til at skapa óheft og gott útvarp, gott blað, góðan portal og góð tiltøk í tí kreativa og mennandi umhvørvinum kring standmyndina av gamla men æviga unga samfelagsrevsaranum Nólsoyar Páll.

Tá vit sjálv skulu siga tað, so halda vit, at tað er eydnast dugnaliga liðinum, starvsfólki og leiðslu í Rás2 at skapa eitt annað slag av útvarpi. Hetta er ikki eitt útvarp, sum skal koma í staðin fyri útvarpið hjá KVF, men Rásin skal vera eitt dygdargott og øðrvísi alternativ til almenna og mangan eitt sindur sjálvhátíðarligu útvarpsrásina. Hetta halda vit er við at eydnast ikki minst takkað verið okkara vinnu- og handilslívi, sum í vaksandi mun sær vakstrar- og menningarnmøguleikar við at lýsa og stuðla uppundir upplýsandi og undirhaldandi sendingar í Rásini. Hetta er hartil við at eydnast takkað verið ídnu, dugnaligu og kreativu starvsfólkunum í rásini, sum dag og dagliga leggja lív og sál í sendingarnar. Vit eru bert byrjað og ætla okkum at halda á við at geva Føroya fólki gott útvarp, gott blað, góðan portal og góð tiltøk og við hesum ynskja vit Rásini tillukku á tvey ára degnum.

**Sosialurin**

## P/F Vága Floghavn má ikki fáa sín vilja - enn

**SJÚRÐUR SKAALE**



**Kanska er ein stór útbygging í Vágum skilagóð. Men hon má ikki gerast fyrr enn vit vita, hvat tað er, vit velja - og hvat vit velja frá. Tí kanska er tað, vit velja frá, tann besti flogvøllurin**

Tann dag, ein størri og betri flogvøllur verður tikin í nýtslu í Føroyum, broytast fortreytirnar hjá samfelagnum.

Útflutningsvinnan verður loyst úr einum hafti, sum í dag ger, at hon er verri fyri enn kappingarneytarnir.

Ferðavinnan fær heilt aðrar møguleikar.

Vinnulívsfólk, sum ferðast nógv, kunnu trygt búseta seg í Føroyum og leggja sítt virksemi í Føroyum.

Ein onnur príslega á ferðaseðlum fer at geva øllum borgarum eitt rásarúm, sum tey ikki hava í dag.

Og hetta fer alt at avmarka fráflytingina úr landinum.

Skulu Føroyar mennast, er ein betri flogvøllur ikki bara ein fyrimunur. Hann er ein fortreyt. Og tí er heilt avgerandi, at vit velja ta allar bestu loysnina.

**Vágar**

Nevndin fyri Vága floghavn legði hósdagin fram nakrar møguleikar fyri útbygging av vøllinum í Vágum.

Mælt verður til, at farið verður longur enn tað, sum higartil hevur ligið í kortunum. Vøllurin skal ikki vera 1600, men 1800 metrar, og terminalurin skal útbyggjast í stigum, so hvørt sum tørvurin veksur. Tosað verður um "tørv og krøv 20-30 ár fram". Prísurin fer uttan iva væl uppum ta hálvu milliardina.

Mælt verður altso óbeinleiðis til, at vit nú endaliga gera av, at flogvøllurin skal vera har, sum hann er.

Tí nýta vit eina hálva milliard í Vágum, so má orsøkin vera, at tað eru Vágar, vit satsa uppá! Og so verður lok sjálvandi lagt á kjakið um ein annan vøll.

Og tað skal berast skjótt at. P/F Vága Floghavn mælir til, at arbeiðið verður boðið út longu hálvan desember - eftir at lóg um tað er samtykt á tingi.

Og á Johan Dahl skilst, at hann tekur undir við hesum.

**Avmarkingar í Vágum**

Hetta merkir, at tingfólk longu í heyst ikki bara skulu seta gongd á eina stóra útbygging í Vágum. Vit skulu við okkara atkvøðu eisini steðga møguleikanum fyri, at vit einaferð fáa ein annan vøll.

Trupulleikin er, at vit als ikki kenna fortreytirnar, tá vit skulu trýsta á knøttin!

Tí tað eru sera nógv ivamál knýtt at útbygginginí í Vágum.

T.d. verður tosað um, at leingja vit vøllin til 1800 metrar, fer at bera væl til at lenda har við størri flogførum - m.a. tí slagnum, sum Atlantsflog nú hevur bílagt.

Men tað eru fólk - m.a. flogskiparar - sum halda, at hvørki 1600 ella 1800 metrar loysa trupulleikarnar í Vágum. Tí turbulensurin fer ongan veg. Og jú størri flogførini eru, jú meira ávirkast tey av turbulensi. Tí verður hildið, at avlýsingarnar verða nógv fleiri, tá flogið verður við størri flogførum enn í dag.

Og so eru tað instrumentlendingarnar - ella automatisku lendingarnar. Tað er framtíðin innan flogferðslu. Og tá ber til at lenda, hóast tað er tjúkt í mjørka. Men tað eru teknikarar sum siga, at hetta ikki fer at bera til í Vágum, tí har skal flúgvast millum fjøll undir lending. Flogfarið má snara eini 14 stig tá flogið verður móti vøllinum - og tað má gerast manuelt.

Tann nýggja tøknin fer at eliminera trupulleikan við mjørka - men Føroyar fáa ikki gagn av hesum, so leingin flogvøllurin er í Vágum.

Siga altso fleiri teirra, sum hava innlitið.

**Mugu vita áðrenn vit avgera**

Tað eru eisini aðrar atfinningar ímóti ætlanini um stóra úbygging í Vágum.

Eg eri ikki førur fyri at meta um hesar atfinningar. Og tað er eingin annar tingmaður heldur.

Men vit kunnu ikki taka endaliga avgerð um staðseting av flogvølli í Føroyum, uttan at hetta er útgreinað.

Tí tá avgerðin er tikin, vendist ikki aftur. Vit brúka ikki fyrst eina hálva milliard í Vágum, og síðani yvir hálvaarðu milliard onkra aðrastaðni.

Hetta er ein tann týdningarmesta avgerð, sum tann politiska skipanin yvirhøvur skal taka. Tí mugu nakrir spurningar svarast, áðrenn Johan Dahl kemur í tingi við ætlanini hjá P/F Vága Floghavn:

Tingið má fáa at vita, um hald er í kritikkinum av hesi ætlan, sum fólk við innliti hava sett fram.

Tingið má fáa at vita, hvat vit fáa fyri ta hálvu milliardina í Vágum. Og hvat vit kundu fingið fyri t.d. ta tríføldu upphæddina onkra aðrastaðni.

So leingi henda vitan ikki fyriliggur, kunnu vit ikki fylgja tilmælinum hjá P/F Vága Floghavn og harvið steðga kjakinum um nýggjan flogvøll í Føroyum.

**Kanska Vágar eru besta loysn**

Tað eru fólk, sum vísa aftur nevnda kritikki, og halda vøllin liggja best har, sum hann liggur. Og onkur sigur, at fyrimunirnir við einum øðrum vølli eru so marginalir, at teir ikki eru verdir at brúka eina milliard uppá.

Ongantíð betur, um hesi hava rætt!

Men vit eru fleiri, sum vilja vita tað.

So góði Johan Dahl: Fá neyðugar kanningar gjørdar, áðrenn tú kemur í tingi við teirri stóru ætlanini í Vágum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.